Janus Einar Sørensen, Kyndil:

# – Alt ov óskarpir



*Janus Einar Sørensen*

Strikuspælarin hjá kyndilsmonnum, Janus Einar Sørensen, var alt annað enn nøgdur við avrikið hjá havnarliðnum í fyrru hálvfinaluni.

– Teir skuldu als ikki havt vunnið við so nógvum málum. Men tað er sama søga umaftur. Vit fáa ikki mál, tí vit eru alt, alt ov óskarpir, segði Janus Einar eftir dystin.

Hann segði eisini, at tað var ov vánaligt av Kyndli at lata strandingar fáa so nógv mál av strikuni.

– Vit vita jú, at teir spæla sera nógv upp á strikuna, og í Alexandur og Arthur Johansen hava teir tveir spælarar, sum duga sera væl at spæla strikuna. Hetta høvdu vit eisini tosað um undan dystinum, og vit høvdu avtalað, at vit skuldu ansa sera væl eftir hesum. Men tað heldur bara ikki í dystinum, og tað er ov vánaligt, heldur Janus Einar Sørensen.

Tó sigur Janus Einar, at teir í Kyndli als ikki hava mist trúnna á, at teir kunnu koma í steypafinaluna í ár.

– Fimm mál er einki at snakka um. Um vit fáa góðan stuðul frá kyndilsáskoðarunum í Havn, so er tað als ikki ómøguligt at vinna samanlagt, segði Janus Einar Sørensen at enda.

**tn**

Mortan Hansen, StÍF:

# – Hetta halda vit



*Mortan Hansen*

Ein av mest sjónligu leikarunum hjá strandingum var strikuspælarin Mortan Hansen, Hann fekk eisini seks av málunum hjá StÍF, og tað er ikki so galið, tá ið havt verður í huga, at hann einans hevur vant í ein mánað.

– Tað gekk bara væl í dag. Eg og Bent (Djurhuus, blðm.) skiftust, soleiðis at eg var í álopinum, og hann var við í verjupartinum. Tað gav mær eisini neyðuga hvíld, soleiðis at man allatíðina hevði orkuna at stríðast inni á strikuni, segði Mortan Hansen eftir dystin.

Spurdur um tað var nakar møguleiki fyri, at strandingar nú fóru at snáva á vegnum í finaluna, segði Mortan Hansen.

– Nei, hetta halda vit. Tað eri eg púra vísur í. Vit manglaðu tveir týðandi spælarar í dag, og teir verða báðir við í hálvfinaluni í Havn, so tá hava vit eitt enn sterkari lið. Vit eru eisini øgiliga uppsettir at røkka finaluni, og við góðum stuðli frá áskoðarunum fara vit uttan iva eisini at basa Kyndli í Havn, segði Mortan Hansen.

**tn**



*Borgar Danielsen var sannur brandur í verjuni hjá StÍF mikukvøldið. Her hevur hann fingið fatur á Róki Akralíð, sum við sjey málum var besti málskjútti hjá Kyndli í fyrru hálvfinaluni.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## StÍF-Kyndil 25-20 (11-7)

# Strandingar á finalukós

**Eftir fyrru hálvfinaluna í Coca Cola kappingini hjá monnum millum StÍF og Kyndil, bendir alt á, at strandingar aftur í ár verða annað liðið í steypafinaluni**

**COCA COLA KAPPINGIN**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

StÍF er um nakar steypaliðið burturav í føroyskum manshondbólti. Strandingar hava síðstu mongu árini verið fremsta liðið í steypakappingini hjá monnum, og aftur í ár sær tað út til, at teir verða við, tá ið steypafinalan verður leikt í komandi mánað. Í gjárkvøldið leikti StÍF fyrru hálvfinaluna ímóti Kyndli, og strandingar vunnu ein tryggan sigur.

### Gekk striltið við málskjótingini

Fyrstu løtuna av dystinum gekk tað rættuliga striltið hjá báðum liðunum at finna vegin til meskarnar. Strandingar vóru rættuliga ágrýtnir í verjupartinum og fóru allatíðina út í gestirnar úr Havn, og tað tóktist ikki hóva kyndilsmonnum.

Í hinum endanum hevði heimaliðið eisini sínar trupulleikar. Gamaní fekk Bent Djurhuus á strikuni nakrar góðar fríspælingar, sum hann tó ikki gjørdi sær dælt av, men annars var tað Alexandur Johansen, sum stóð fyri tí, ið strandingar høvdu at bjóða fyrsta korterið.

So líðandi vóru tað tó strandingarnir, ið settu seg á dystin, og tað gjørdi góðan mun, tá ið Mortan Hansen kom inn á strikuna. Mortan dugdi væl bæði at skapa pláss fyri skjúttunum og at lofta innspælingum, sum hann síðani sendi í meskarnar.

Kyndil hevði framvegis trupulleikar í sínum álopsspæli, og mangan tóktist tað sum um, at teir grønu úr Havn spældu nógv truplari, enn neyðugt var.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki misti Kyndil Josef Abrahamsen, sum á veg aftur í verju stóð fastur í gólvinum og meiddi sær knæið. Hetta var sjálvsagt ein smeitur fyri havnarliðið.

### Luktaði av stórsigri

StÍF var á odda við fýra málum í hálvleikinum, og henda støða helt sær so at siga fyrsta korterið av seinna hálvleiki. Men so setti heimaliðið ferð á, og tá ið fimm minuttir vóru eftir at leika, vóru teir á odda við átta málum, og tað luktaði av stórsigri til strandingar.

Men Kyndil fekk tikið seg eitt sindur um reiggj móti endanum av dystinum, og teir minkaðu nakað um munin, soleiðis at tá ið liðugt var, stóð tað 25-20 til StÍF á máltalvuni.

At strandingar skuldu vinna ein so mikið tryggan sigur, var eitt sindur óvæntað, tí strandingar høvdu hvørki sterka rumenska málverjan, Marian, ella Svein Justinussen við í hópinum, tí teir vóru ávíkavist leikbannaðir og burturstaddir. Nú Marian var leikbannaður, fekk ungi Rókur Nielsen møguleikan millum stengurnar hjá strandingum, og tað er einki at at taka seg aftur í, at hann stóð ein fínan dyst.

Við 25-20 sigrinum hava strandingar eitt sera gott útgangsstøði undan seinnu hálvfinaluni, sum verður í Havn um tvær vikur. Ikki tí, Kyndil kann, um teir hava ein góðan dag, eisini vinna samanlagt, men tað verður ógvuliga trupult, tí tað er sera sjáldsamt, at StÍF tapir við nógvum málum. Tí bendir alt á, at StÍF aftur í ár verður annað av liðunum í steypafinaluni hjá monnum.

## FAKTA

**StÍF-Kyndil 25-20(11-7)**

**StÍF:** Arthur Johansen 7(4), Mortan Hansen 6, Alexandur Johansen 5, Borgar Danielsen 4, Jørmund Joensen 2, Pauli Hansen 1

**Kyndil:** Rókur Akralíð 7, Høgni Klein 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Janus Einar Sørensen 2, Marius Joensen 2, Josef Abrahamsen 2(1), Poul Rói Mohr 1

**Brotskøst:** StÍF 5(4), Kyndil 2(1)

**Útvísingar:** StÍF 2, Kyndil 3

**Dómarar:** Kristian Johansen og Sámal Paulason – Viðhvørt tóktist tað sum um, at somu reglur ikki vóru galdandi í báðum endum av høllini, og tað kundi verða ørkymlandi. Hinvegin lótu teir báðir seg ikki ávirka av teimum mongu tápuligu viðmerkingunum, sum summir spælarar hava til at kalla hvørja einastu dómaraavgerð